Alternativi handilsma›urin úti í Grønlandi fimti

50 ár eru nú sí›an, at Johannes Andreasen lat handil upp á Grønlandsvegnum, har húsast ver›ur enn. Eftir eitt sera spennandi og hendingaríkt lív valdi hann at seta búgv í Havn. Handilin er nú í hondunum á tri›ja ættarli›i

STEFAN Í SKORINI

N‡mála›i brandguli handilin stendur kroystur uppat vegnum. Tá hur›arnar inn í handilin latast upp, ført tú tó ikki eina kenslu av, at handilin hevur runda› tey hálvthundra› árini. Handilin er tykist vera n‡ggjari enn so, og dámurin inni er sum í einum hvørjum ø›rum kolonial handli íHavn. Teir hava megna› at fylgt vi› tí›ini, og handilin er tískil ikki avolda›ur.

Ta›, sum tú tó ikki grunar vi› fyrsta eygnakast, er, at hesin handilin hevur eina áhugaverdari søgu enn a›rir.



Johannes Andreasen reika›i runt um í heiminum í ungdómsárunum, men hann setti búgv í Havn í 1931 og fór at handla í 1933

Hev›i loyniliga uppskrift

– Pápi fór undir at handla fyrst í 30unum, og hetta vóru sera ringar tí›ir í Føroyum og kring heimin. Tí var ofta sera tungt at fáa ta› at mala runt, og fleiri handilsmenn vóru í Havnini tá, sigur Arne Andreasen.

Handilin helt til í fleiri ymsum húsum kring um í b‡num, alt eftir hvar pláss var.

Handilsvirksemi› var tó ikki nóg miki› til húsarhaldi›, og tí mátti finnast uppá rá›. Onkur ba› hann fara undir at gera ís og selja úti á gøtuni í b‡num. Hetta vísti seg at vera eitt frálíkt hugskot, tí ísurin gjørdist væl umtóktur millum havnabúgvar.

– Pápi kom fram til eina sera gó›a uppskrift til ísin, so hann gjørdist sera vælsmakkandi. Hann helt hana tó loyniliga fyri øllum, og eingin fekk at vita, hvat ta› var fyri evni, sum pápi n‡tti fyri at fáa tann serliga smakkin, sigur Arne.

Ta› hendi tó meira enn so, at fólk komu inn, me›an Johannes gjørdi ís fyri at sneyta eftir uppskriftini. Johannes var tó avgjørdur, og hann var altí› einsamallur, tá hann lat loyniliga innihaldi› úti ísin.

Palle Bager lærdi Johannes at gera ísin, og ta› vóru fleiri í Havn um ta› mundi›, sum eisini gjørdu ís heima. Sonurin Arne tók sær ofta av at gera ísin, og ta› var ikki hvør ma›ur, sum var førur fyri at gera ís, tí ta› var tungt arbei›i.

– Eg kundi ikki torga at gera ís, tí ta› er ta› strævnasta og tyngsta arbei›i›, eg nakrantí› havi roynt. Tú mátti sita og vinda í næstan ein tíma, á›renn ísurin var klárur at selja. Hetta gav eisini gó›a armstyrki, minnist Arne.

Tá ísurin var li›ugur, var› hann trilla›ur á súkklu oman í mi›b‡in, har hann var› seldur. Onkran gó›an dag kundi sølan vera eini tríggjar spannir av ísi. Ein spann var ta› minsta, tey plagdu at selja.

Seinni fingu tey ein elektromotor, sum gjørdi arbei›i›, so ta› slapst undan at sita og vinda. Hesin helt tó ikki leingi, tí stutt eftir fingu tey veksilstreym, og motorurin kundi bara n‡tast til javnstreym.

Stutt eftir at handilin flutti út á Grønlandsvegin, góvust tey vi› at gera ís. Orsøkin var, at tollur var› lagdur á ísin, og eisini var› álagt, at øll innihaldsevnini vór›u uppgivin.

Fjakkarin Johannes

Handilin ber navni› hjá manninum, sum fekk handilin upp at standa. Johannes Andreasen var borin í heim í Hvalba í 1894, og fór til skips sum vanligt var tá á døgum bara 14 ára gamal.

– Pápi hevur havt eitt ótrúliga spennandi og hendingaríkt lív. Eg sigi tó ikki, at ta› altí› var so hugaligt, men merkt av hør›um arbei›i, sigur Arne Andreasen, sonur Johannes.

Eftir tr‡ ár á sjónum gekk lei›in út í heim. Danmark var fyrsti ste›gurin, har hann arbeiddi í Hillerød. Hugurin um ta› mundi› lá tó longri úti í heimi. Í 1914 fór hann til høvu›ssta›in í Noregi, Oslo, sum tá kalla›ist Kristiania. Ha›ani gekk lei›in vi› eini finskari f‡ra mastra›ari bark til Melbourne í Australia. Eftir f‡ra mána›ar á sjónum r‡mdi Johannes í land, og ste›gurin var tr‡ ár í landinum »Down Under«.

Í 1917, tá fyrri heimsbardagi lei› móti endanum, leg›i Johannes lei›ina tvørturum Kyrrahavi› til Amerika, har hann royndi at finna eydnuna. Aftur her fór hann av skipinum og í land, har hann var vi› einum sleipibáti í havnini í New York. Var í hesum arbei›i í f‡ra mána›ir, á›renn hann fór til Minneapolis í statinum Minnesota.

Violinspæl hev›i Johannes lært í Australia, og hesum helt hann fram vi› í Minneapolis. Her bú›i hann til 1921. Ein av hansara kenningum seg›i myndugleikunum, at Johannes ikki hev›i loyvi at vera í landinum, og tí var› hann handtikin og sendur heim til Føroyar. Me›an Jóhannes bú›i í New York, fekk hann ein dagin vitjan úr Føroyum. Thorstein Arge, sum var bró›ir Niels Arge, var farin til USA, og hann støkk einafer› inn á gólvi› í íbú›ini hjá Johannesi.

Finnir maka í Rotterdam

Eftir bara tvey ár í Føroyum fór Jóhannes til Danmarkar í 1923 at royna seg sum tónleikara á matstovum í Keypmannahavn. Hesum helt hann ikki leingi á vi›, men fór aftur út á hav at vinna til lívsins uppihald. Johannes var vi› fleiri skipum í hesum tí›arskei›num til 1931, tá hann møtir Hjørdis, sum var úr Noregi. Tey bæ›i funnu saman í Rotterdam, har hon arbeiddi á norsku sjómanskirkjuni. Tá Johannes fyrstu fer› kom til sjómanskirkjuna í Rotterdam, møtti hann Viggo Dahl Christiansen. Presturin ba› Johannes fara avsta› aftur, tí kirkjan var ikki opin tann dagin, men aftanfyri prestin stendur Viggo. Johannes hev›i undirvíst Viggo í violinspæli, tá hann bú›i í Havn frá 1921-23. Teir høvdu tá ikki sæ› hvønn annan í fleiri ár. Tá teir møttust aftur í Rotterdam, lupu teir um hálsin hvør á ø›rum í berari gle›i.

– Eitt av skipunum, i› pápi var vi›, kalla›ist Kastelholm, sum var› minusprongt í 1942 vestanfyri Føroyar. Manningin kom øll inn á Sjómansheimi›, og tá hann frætti tí›indini, fór hann vi› sjógv á bak oman at vita, um hann kundi hitta manningina. Teir vóru tá júst farnir út á ein enskan trolara, sum skuldi føra teir ví›ari. Pápi fekk at vita, at skiparin var tann sami, sum førdi skipi›, tá hann sjálvur var vi›. Hann i›ra›i seg nógv um, at honum ikki eydna›ist at hitta skiparan, sigur Arne.

Johannes fór heimaftur til Føroyar í 1931, og hann giftist Hjørdis ári› eftir. Johannes anda›ist í 1968, me›an Hjørdis var› borin í kirkjugar›in í 1984.

Bygdi í Grønlandi

Johannes og konan gjørdu enn eitt rend út um landoddarnar beint eftir kríggi›. Tey lótu handil upp í Danmark, men komu heimaftur í 1947. Tr‡ ár seinni var› húsi› bygt í Grønlandi. Tey høvdu handil og heim í sama bygningi tá.

– Pápi bardist fyri at fáa loyvi at byggja heilt út til vegin, sjálvt um b‡rá›i› nokta›i fyrstu fer›. Ta› var t‡›andi tá, at hava eina inngongd á gøtuhorninum. Tá var› ikki hugsa› um, at bilar skuldu kunna setast uttanfyri, tí teir kundu kanska teljast á a›rari hondini, sigur Arne.

Gólvíddin í handlinum er nógv økt, sí›an lati› var› upp fyri 50 árum sí›an. Um hugt ver›ur uppundir lofti› ber til at síggja, hvussu tey hava tiki› fleiri og fleiri rúm vi› í handilin seinasu árini. F‡ra fer›ir er gólvplássi› í handlinum ví›ka›.

Handilin ver›ur nú rikin av brø›runum Peri og Kára. Teir hava tiki› vi› eftir pápan, Arna, i› tók vi› eftir Johannes. Handilin ver›ur tískil rikin av tri›ja ættarli›i.

– Eg gekk í preliminer skúla, tá handilin lat upp í n‡ggjum hølum í 1950. Tvey ár seinni fór eg at arbei›a í handlinum, men tí›irnar vóru sera ringar, og eg gavst eftir eitt hálvt ár, tí ov líti› var at gera. Umsetningurin mundi ofta ver›a um tær túsund krónurnar um mána›in, sigur Arne.

Arne tókst vi› ymiskt fyrifallandi arbei›i, inntil pápin aftur heitti á hann um at taka yvir eftir seg og reka handilin. Hetta var í 1957. Húsini har um lei›ir stó›u ikki so tøtt tá sum nú, men so hvørt sum fleiri hús løgdust afturat í grannalagnum, vaks kundagrundarlagi› hjá handlinum.

Ígjøgnum árini er handilin broyttur nógv. Í 1965 var› fari› yvir til sjálvtøku, og so er handilin vaksin so hvørt. Í 1974 flutti familjan úr bygninginum, har handilin er, og bygdu eini sethús nærhendis.

– Nógv er broytt sí›an handilin lat upp her úti, sigur Arne, tá var ikki vanligt, at handilsmenn keyptu vørur fyri fimm krónur og seldu fyri f‡ra, sum ofta hendir nú, leggur Arne læandi afturat.

– Eg havi fingi› bæ›i skolur og rós frá kundum hesi mongu árini, men tú mást bara møta teimum vi› einum smíli og royna at taka ta› til eftirtektar, sum kundin sigur, sigur Arne.

Uppfinningarsamir

Ikki kann sigast anna›, enn at uppfinningarsemi er ættarbreg›i. Tá Johannesi í 30'unum vanta›i pening fyri at fáa alt at hanga saman, fór hann undir at gera ís. Tá vit fingu ringar tí›ir í Føroyum fyri eini tíggju árum sí›an, fór handilin at selja døgur›amat sum eitt gott ískoyti til vanligu sølguna.

– Tá kom aftur ta› alternativa fram í okkum á sama hátt sum vi› ísinum, grei›ir Arne frá. Diskurin til heita matin kom longu í 1986, men var› ikki tikin í n‡tslu fyrr enn eini tr‡-f‡ra ár seinni. Ta› byrja›i í smáum, men er nú komi› í eina fasta legu.

Handilin hevur sta›i› í sama sta›i í hálvthundra› ár, men fe›garnir vænta ikki, at hann ver›ur verandi í hálvthundra› ár afturat. Til ta› er umstø›urnar ov trongligar, men ætlanir eru tó ikki um at flyta ella lata aftur í bræ›i.

Alternativu handilsmenninir úti í Grønlandi finna tó altí› uppá rá›.

Fa›irin Arne Andreasen í mi›juni, sum tók vi› handlinum eftir pápan, saman vi› synunum Kára vinstrumegin og Peri høgrumegin. Her standa teir frammanfyri handlinum, sum abbi teir bá›ar, Johannes Andreasen, stovna›i

Mynd Jens Kr. Vang

Veðrarnir vóru eitt vónbrot í ár

Veðrasýning hevur verið í Hvalba, men teir vóru ikki serliga væl nøgdir við úrslitið

ÁKI BERTHOLDSEN

Veðrarnir í Hvalba eru ikki so vakrir í ár, sum teir annars hava verið tey seinastu árini.

Hetta máttu dómararnir ásanna, tá ið hvalbingar høvdu veðrasýning seinasta leygardag.

Tá ið dómararnir vóru lidnir at skoða veðrarnar, mátti tann eini dómarin, Petur Karl av Rana, staðfesta, at í ár vóru veðrarnir eitt vónbrot.

Hinir báðir dómararnir vóru Frits Poulsen úr Sumba og Ásmundur Bærendsen av Tvøroyri.

Petur Karl av Rana sigur, at í ár vóru bæði beinini og ullin vánaligari enn tey hava verið undanfarnu árini og tað dregur nógv frá, tá ið metast skal um ein veðr.

Hann sigur, at tað er ein stórur spurningur, hvussu tað ber til, at seyður kann broytast so nógv frá einum ári til annað.

Hann nevndi dømi um eitt lamb, sum hevði fingið úrvalsvirðisløn fyri alla Suðuroynna í fjør.

Síðani er tað broytt so nógv, at nú tað var við á veðrasýningini í ár, var tað við bit og slit, at tað fekk 2. virðisløn.

Kappast var í tveimum bólkum. Teir veturgomlu veðrarnir vóru í øðrum bólkinum og í hinum bólkinum vóru veðrar, sum vóru tvævetur og eldri.

Yvirhøvur vóru teir veturgomlu veðrarnir so vánaligir í ár, at av teimum veturgomlu veðrunum, sum vóru við á sýningini, var tað ongin, sum var mettur at vera nóg góður til at fáa 1. virðisløn.

Kortini fingu teir vakrastu veðrarnir steyp.

Eliesar Poulsen, sum skipar fyri veðrasýningunum, veit heldur ikki hví, at veðrarnir ikki eru so vakrir í ár.

–Tað vísir seg kanska, at veðrar, sum ganga á bleytari jørð í eini trøð, linka í afturbeinunum. Hinvegin vóru veðrarnir, sum komu úr feitilendi, nógv betri, tí teir hildu sær betri.

Annars vóru veðrarnir tyngri í ár, enn teir hava verið fyrr. Fleiri vigaði nøkur og níti kilo, og heilt nógvir vigaði nøkur og 80 kilo.

–Hetta sigur okkum, at hóast tað hevur verið óvanliga turt, so hevur grasið verið gott.

Somu ganga aftur

Hetta er sjeyndu ferðina, at skipað er fyri veðrasýning í Hvalba. Øll árini, uttan tað fyrsta árið, er virsðisløn eisini latin fyri tann tyngsta veðrin.

Og hóast støðið í ár var lægri, enn tað hevur verið seinastu árini, so vísti tað seg, at tá ið virðislønirnar skulu latast, eru tað sum heild somu menn, sum ganga aftur ár undan árið.

– Tvs, at tað eru summir menn, sum gera sær størri ómak við seyðinum enn aðrir, staðfesti Petur Karl av Rana.

Hermundur Hentze fekk virðisløn fyri at hava tann tyngsta veðrin.

Tað virðislønina hevur hann fingið hvørt einasta ár, síðani teir fóru at lata virðisløn fyri tyngsta veðr.

Men í ár vigaði veðrurin kortini eitt sindur minni, enn hann hevur gjørt seinastu árini.

Í 1998 vigaði hann 98 kilo, í fjør vigaði hann 97 kilo og í ár vigaði hann 95 kilo.

Eliesar Poulsen fekk sjálvur steyp fyri at hava tann vakrasta veturgamla veðrin av teimum, sum vóru.

Hann var 79 sentimetrar høgur, bróstmálið var 98 sentimetrar og hann var 18 sentimetrar um mjóryggin.

Steyp fyri næstvakrasta veðrin fekk Jósvein Ellendersen, tað fekk hann fyri áðurnevnda veðrin, sum fekk úrvalsvirðisløn sum lamb í fjør.

Steyp fyri triðvakrasta veðrin fekk Vilmund Michelsen, sum eisini eigur ein hóp av steypum á hyllini frá sýningunum, sum hava verið árini frammanundan.

Av teimum veðrunum, sum vóru tvævetur og eldri, fekk Vilmund Michelsen bæði steyp fyri tann vakrasta og tann næstvakrasta.

Tann vakrasti var 86 sentimetrar høgur, bróstmálið var 110 sentimetrar og hann var 20 sentimetrar um mjóryggin.

Steypið fyri tann triðvakrasta veðrin fekk Eliesar Poulsen.

Tilsamans vóru 43 veðrar við á sýningini. Av teimum vóru 11 veðrar tvævtur og eldri.

Dygdin hækkað

Annars sigur Eliesar Poulsen, at yvirhøvur er dygdin á seyðinum nógv hækkað, síðani teir fóru í holt við sýningrnar fyri sjey árum síðani.

–Serliga hesi seinastu tvey, trý árini, er tað týðiligt, at tað sæst aftur, at menn eru farnir at vanda sær meiri um at fáa vakran seyð.

Annars er ætlanin at sýna lomb í Hvalba 4. november.

Men áðrenn tað verða eisini sýningar í Trongisvági, Í Hovi, í Porkeri, Í Vági og á Tvøroyri.

Eliesar Poulsen fekk tvær virðislønir á veðrasýningini leygardagin fyri veðrarnar, sum standa aftanfyri. Men yvirhøvur vóru veðrarnir í ár ikki so vakrir, sum teir hava verið seinastu árini



Hermundur Hentze fekk aftur í ár virðisløn fyri at eiga tann tyngsta veðrin. hesa virðislønina hevur hann nú fingið í seks ár upp í slag. Her er Hartvíg Hammer avmyndaður við tí tyngsta veðrinum, tí tað var hann, sum tók ímóti steypinum

Sjófólk skulu nú fáa betri heilsutænastur

Tað er dýrt at bróta túr av fyri at fara inn við sjúkum fólki. Arbeitt verður nú við eini ætlan, har tað skal bera til at viðgerða meiri umborð á skipunum

ÁKI BERTHOLDSEN

Arbeitt verður nú við eini skipan, har tað í størri mun skal bera til at viðgerða sjófólk umborð á skipum, heldur enn at flyta tey til lands at fáa viðgerð fyri sjúkur ella skaðar.

Í uppskotinum til fíggjarlóg fyri næsta ár, sum varð lagt fram í gjáramorgunin, verður víst á, at sjófólk hava ikki sama møguleika at fáa tænastur frá heilsuverkinum, sum hinir skattgjaldarnir hava.

–Hetta ger seg serliga galdandi fyri sjófólk í langfarasigling, har tað kostar nógv at bróta túr av, fyri at fara inn við sjúkum fólki.

Men nú uppskotið til fíggjarlóg verður lagt fram, sigur Almanna- og heilsumálastýrið, at nú á døgum ger tøknin, at tað ber væl til at senda bæði ljóð og myndir yvir fylgissvein.

Og tað ger, at tað eisini ber til at veita sjófólkið eina nógv neyvari tænastu.

Fólk úr heilsuverkinumí Grønlandi, Føroyum og Íslandi hava fingið 35.000 krónur í stuðuli frá Norðuratlantssamstarvinum, NORA, til at menna eina skipan, so at tað ber til hjá heilsuverkinum í Føroyum, Íslandi og Grønlandi at fáa upplýsingar frá skipum um fylgissvein.

Talan kann t.d. verða um litmyndir, sum kunnu verða sera hentar og nýtiligar, um lækni á landi skal geva góð ráð um, hvussu, t.d. sár, skulu viðgerast.

Men talan kann eisini vera um at senda hjartabílat, EKG.

Forteytin fyri at fáa eina slíka skipan at virka, er kortini, at bæði heilsuverkið og skip fáa neyðuga útgerð og útbúgving í at brúka hana.

Tær 350.000 krónurnar, sum NORA hevur játtað tilsamans, er ikki nóg mikið til at fáa skipanina at virka í Føroyum.

Almanna- og heilsumálastýrið heldur tí, at tað er rætt at seta 500.000 krónur av á komandi fíggjarlóg til endamálið.

internethandilin

hallo.fo

Tórshavn - Tlf. 218500 - hallo@hallo.fo

ERICSSON NOKIA SIEMENS MOTOROLA

NOKIA 3210

• Innbygda antennu
• SMS
• 3 spøl
• Sera nemt at skifta front, ið fæst í fleiri litum

kr. 1.599,-

SIEMENS M35i

• Lítil, gul og cool
• Innbygda antennu
• Vibrator
• SMS
• 4 spøl

kr. 1.999,-

MOTOROLA V.2288



• Innbygt FM radio
• v/ stereo headset
• SMS
• Sera nemt at skifta front, ið fæst í fleiri litum
• 2 frontar fylgja við

kr. 2.299,-

Sosialurin - 311820

Keyp tá ið tygum hava tíð... Vit hava opið nú og 24 tímar um døgnið - hvønn dag á www.hallo.fo

www.hallo.fo

Bílegg on-line á www.hallo.fo ella ring tel. 218500